## DAGSINS MEINING

# Alt stendur opið í Norðstreymi

Er valið spennandi í Sandoynni og í Vágum, so verður tað ikki minni spennandi í enn einum av teimum smærri valdømunum, Norðstreymoy. Har eru eisini tveir umdømisvaldir tingmenn. Og í løtuni ein eykavaldur.

Seinasta val hendi tann heldur óvantaða broyting, at B, sum hevur átt annan sessin alla øldina, misti hann. Fólkaflokkurin fekk eitt sera gott val við sínum nýggja kanditati í Kollafirði. Út frá søguliga veruleikanum og eisini veljarakanningunum og tí sannroynd, at atkvøðuslúkarin hjá A ikki stillar uppaftur, kundi nógv bent á, at B fær sín mann aftur í Norðstreymoy. Men lat okkum undirstrika, einki er avgjørt undan valinum.

Hvør so fer avstað við hinum tingmanninum er ilt at meta um. E eigur hann í løtuni, meðan C eigur eykamann í valdøminum. Tað hendi eftir, at C misti umdømisvalda mannin í Sandoynni seinast og fekk hann tí eykamannin, har flestar avlopsatkvøður vóru. Og tá vóru tær í Norðstreymoy. Hetta gjørdi, at Hans Pauli Strøm kom á ting fyri fyrstu ferð. Hann hevur so roynt seg í eitt valskeið og er tað so upp til veljaran at viga hann og onnur valevni. Tað er ikki sagt ov nógv, tá sagt verður, at Hans Pauli Strøm hevur verið rættiliga virkin og grundigur í sínum tingarbeiði. Hann hoyrir til teir tingmenn, sum hava verið oftast á røðarapallinum og hevur hann markerað seg rættiliga nógv serstakliga í landspolitiskum málum. Nú C kann fáa umdømisvaldan mann í Sandoyar valdømi, í Skopun ella á Sandi, er møguleikin fyri at fáa eykamann í Norðstreymoy lítil. Tvs. siga, at skal C hava tingmann valdan har, so má hann upp í stríðið um teir umdømisvaldu.

E hevur vanliga staðið seg væl í Norðstreymoy, meðan tað hevur gingið upp og niður hjá C. Seinast C hevði umdømisvaldan tingmann har var tá Tummas Arabo stillaði upp. Nú stillar hann upp í Suðurstreymoy. Hyggja vit at E, so hava fleiri av teimum gomlu tingmonnunum avgjørt ikki at stilla uppaftur. Tó er Norðstreymoy eitt undantak, har ein av gomlu veteranunum Jógvan Durhuus stillar uppaftur.

Spenningurin um úrslitið av valinum í Norðstreymoy er øgiligur. Bæði A,B,C og E kunnu fáa menninar ella kvinnurnar. Uppstillingin, veljarakanningar, politiska rákið osfr. benda allar tann vegin, at allar dyr standa opnar. So samanumtikið kann sigast, at tey trý býligastu valdømini í landinum, Sandoy, Vágar og Norðstreymoy við sínum seks tingsessum, kunnu vera rættiliga avgerandi fyri endaliga valúrslitið fyri alt landið og harvið eisini avgerandi fyri, hvussu eitt komandi landsstýri fer at síggja út.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Et er søkort at forstå …

**Thomas Arabo**
*valevni Javnaðarfloksins*



Tað er nógv fyri, at annað av føroysku fólkatingsumboðunum lítið annað ger, enn gongur og spælir 20 spurningar til professaran niðri á Christiansborg fyri at royna at fáa rok uttan nakran praktiskan týdning.

Vit kunnu loysa og gerast ein nation í ST høpi í morgin, um vit vilja, men føroyingar vilja ikki loysa í løtuni. Hetta er veruleikin, ið umfatar sjálvt Torbjørn Jacobsen.

Vit hava brúkt eitt heilt valskeið, har man hevur framleitt frágreiðingar um loysing, og nú skal ein gamal kenningur í fullveldishøpi, íslendarin Gudmund Alfredsson, gera enn fleiri óheftar frágreiðingar.

**Spilt tíðina í meira enn 3 ár**

Politikkur snýr seg um avgerðir. Alt gott um eina frágreiðing og ráðgeving annars, ið kann sammetast við eitt sjókort, ið kann vísa á leið. Trupulleikin er bara, at yngru Tjóðveldismenninir framleiða tað eina kulørta sjókortið fyri og annað eftir, uttan at skútan flytir seg ein tumma. Høvdu teir av øllum illum framt yvirtøkur í hesum valskeiðnum, heldur enn niður yvir nakkan á komandi løgtingum, men nei! Teir vilja sleppa at seta út í kortið fyri øll onnur, tí at teir halda seg vita akkurát - teoretiskt - hvussu skútan skal sigla. Eitt gamalt orðatak, ið Høgni Hoydal og ikki minst Torbjørn Jacobsen, eiga at skriva sær aftanfyri oyrað er, at "et er søkort at forstå, et andet skib at føre".

# Javnaðarflokkurin: Fólkið fyrst – vælferð Føroya fólks! Samgongan: Fullveldið fyrst – loysing um fýra ár!

**Birgir Mohr**
*Sandi*



Føroya Javnaðarflokkur fer at fremja eina nýggja avtalu við Danmark – eina sjálvstýrislóg, sum ger, at vit vera innan fyri ríkisfelagsskapin og viðtakast í komandi løgtingsetu.

Harvið skuldi tosið um fullveldi og loysing verið loyst, fyri eina rímuliga tíð framyvir og tær politisku kreftirnar kunnu nýtast til at bøta um korini hjá Føroya fólki.

At seta fólkið fyrst og tess vælferð merkir, at Javnaðarflokkurin fer av øllum alvi at bøta um **livikorini hjá teim eldru og gomlu**. Flokkurin ætlar at byggja 160 nýggj røktarheimspláss. Verður málið nátt, so er ein fittur partur av hesum tørvi nøktaður. Sitandi samgonga bygdi einki nýtt røktarheimspláss í fýra ár.

Eisini fer Javnaðarflokkurin at bøta um pensiónsviðurskiftini soleiðis, at fólkapensiónin og samhaldsfasti tilsamans skulu innan fýra ár hækkast til at geva eina pensión til støk upp á min. kr. 10.000,- um mánaðin og til hjún min. kr. 16.000,- um mánaðin.

Heilsuverkið skal hava nøktandi játtanir, so starvsfólkini ikki vera overvað har og soleiðis at vit sleppa av við bíðiraðirnar til viðgerð á okkara sjúkrahúsum. Føroyingar skulu aftur vera tryggir – tá vit vera sjúk – á hondunum á teim, sum starvast í heilsuverkinum. Undir hesari samgonguni hevur ótryggleikin verið vaksandi.

Skúlaverkið má fáa tær neyðugu karmarnar og játtaninar at virka optimalt í mun til skúlalógina, soleiðis at fólkaskúlin gevur besta førleika til okkara børn og soleiðis at tey, sum starvast við skúlan, kunnu trívast í yrki sínum. Undir hesari samgonguni hava vit fingið verkføll í fólkaskúlanum, sum ongantíð var hent fyrr og helvtin av øllum lærarum í Føroyum vilja í annað starv, tí landsmyndugleikarnir hava niðurprioriterað skúlaverkið.

Tey møguleikaskerdu hava ongan ans fingið hesi seinastu fýra árini. Tað er bráneyðugt at hugsa verður um at bøta um bústaðarmøguleikar og vard arbeiðspláss til hendan bólkin av okkara fólki. Vit eiga at minnast til, at vælferðin verður mett eftir, hvussu teir veikastu bólkarnir í einum samfelag hava tað.

Av hesum og nógvum øðrum orsøkum er tað alneyðugt at orkan hjá politikarunum ikki øll fer til at fáast við fullveldi og loysing, men verður nýtt til at varðveita og bøta um – styrkja vælferðina hjá fólki okkara.

Fólkið fyrst, tað vil Javnaðarflokkurin – veljið Javnaðarflokkin.


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Fullveldi versus ríkisfelagsskap

**Johan Dahl**
*Valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Nú í skjótt fýra ár hevur henda samgongan gingið í klingur í fullveldismálinum og er til endan komin aftur til "point zero", har størsta roysnið í teirra verð var at skerja blokkin - eitt sjeymílalop móti fullveldinum kann sigast.

Eg havi mangan spurt meg sjálvan - er tað veruliga so galið við okkara ríkisfelagskapi, sum loysingarmennirnir vilja gera tað til?

Niðurstøðan hjá mær er, at hesin felagskapur slettis ikki er so ringur, sum hann verður gjørdur til, men hevur nógv fleiri positivar enn negativar síður, tá gjørt verður upp.

Vit hava jú nærum allar teir fyrimunir, sum hugsast kunnu. Vit hava alt tað, eitt hvørt nýmótans, framkomið samfelag hevur, umframt alt tað, nógv onnur kundu hugsað sær.

- Vit hava okkara egna lóggevandi vald (Løgtingið)
- Vit hava okkara egnu stjórn (Landsstýrið)
- Vit hava okkara egna stjórnarleiðara (Løgmann)
- Vit hava okkara egna mál (Føroyskt)
- Vit hava okkara egna flagg (Merkið)
- Vit skipa okkara egna lógarpolitikk
- Vit skipa okkara egna vinnupolitikk
- Vit skipa okkara egna umhvørvispolitikk
- Vit skipa okkara egna mentunarpolitikk
- Vit skipa okkara egna almennapolitikk
- Vit skipa okkara egna útbúgvingarpolitikk
- Vit ráða yvir øllum tilfeingið í havinum uttan um okkum
- Vit ráða sjálvir fyri, hvussu tað verður gagnnýtt
- Vit ráða sjálvir yvir øllum inntøkum
- Vit skipa sjálvir fyri eftirliti og trygd
- Vit samráðast við onnur lond um loyvi til at gagnnýta part av teirra tilfeingi
- Vit samráðast við onnur lond um marknaásetingar
- Vit samráðast við onnur lond um handilsavtalur
- Vit ráða yvir øllum tilfeingi í undirgrundini
- Vit løggeva um ræðisrættindini av tilfeingi í undirgrundini
- Vit gera avtalur um gagnnýtslu av tilfeinginum í undirgrundini
- Vit skipa sjálvir øll umhvørvis- og trygdarkrøv
- Vit ráða sjálvir yvir møguligum oljuinntøkum
- Vit eru longu í neyvum samstarvi við annað land (Danmark)
- Vit avgera sjálvi í hvønn mun hetta samstarv virkar (Okkum til besta)
- Vit kunnu til eina og hvørja tíð gerast ES borgarar, uttan at vera limir .
- Vit kunnu til eina og hvørja tí og á einum og hvørjum stað kalla okkum føroyingar
- Vit eru málsliga betri fyri enn flestu fólk í heiminum.

**Kann blokkstuðulin gagnað samfelagið okkara?**

Tann spurningurin kann svarast við nøkrum spurningum - og tað kundu saktans verið fleiri:

- Eru umstøðurnar hjá okkara gomlu optimalar? – svarið er NEI
- Eru pensjónsviðurskiftini í lagi? - svarið er NEI
- Eru sjúkrahúsvirðurskiftini í lagi? – svarið er NEI
- Eru ansingarviðurskiftini í lagi? – svarið er NEI
- Er samferðslukervið nóg nógv útbygt? – svarið er NEI
- Eru samferðslutólini tillagað nútíðarkrøvum? – svarið er NEI
- Kunnu vit verða nøgd við ikki at geva alla frálæru í Føroyum? – svarið er NEI
- Menna og stuðla vit føroyskari mentan í nóg stóran mun?? – svarið er NEI
- Er tað í lagi, at onki granskingarumhvørvi finst í Føroyum? – svarið er NEI
- Er tað í lagi, at fólkið knógvar undir skattabyrðum? – svarið er NEI
- Er tað í lagi, at høvuðsvinnutólið er gamalt og niðurslitið? – svarið er NEI
- Er tað í lagi, at vit framvegis ikki hava møguleika fyri farmaflutningi loftvegis? –svarið er NEI.

Jú, so sanniliga kann blokkurin brúkast við skynsemi og samstundis tæna landi og fólki – og óansæð hvussu Høgni & Co rokna, so er hann eisini neyðugur til vit hava funnið arða inntøku sum kann koma ístaðin.

Sambandsflokkurin vil verja og tryggja vælferðarsamfelagið innan fyri ríkisfelagskapin.

Hvar tú setur krossin tann 30. april er sera umráðandi fyri framtíð okkara.

X við lista B – trygdin fyri teg.

# Fogh gjørdi tað, sum løgmaður átti at havt gjørt

**Jóanes Eidesgaard**



Í gjár bórust tey tíðindini, at danska forsætismálaráðið hevði boðað Løgmansskrivstovuni frá, at allar samráðingar millum føroyskar og danskar myndugleikar um ætlaðar yvirtøkur verða lagdar á ís til eftir løgtingsvalið.

Ikki óvæntað kom so varaløgmaður við viðmerkingini um, at nú løgdu danskir myndugleikar seg út í føroyska valstríðið. So sóu vit aftur hógvarnar av danskari imperialsimu var boðskapurin frá Høgna Hoydal.

Tá val er útskrivað, er politiska støðan ein heilt serlig. Eg eri púra sannførdur um, at rætt er, at ongar slíkar týdningarmiklar samráðingar eru, meðan valstríðið er. Og hetta er heldur ikki vanligt í londunum rundan um okkum. Hetta varð eisini gjørt vart við frá á tingsins røðarapalli, nú beint áðrenn tingið fór til hús.

Løgtingið fer til hús, tí man metir, at tað er rættast, tí annars vil valstríðið merkja løgtingsarbeiðið meira enn gott er. Tað gav at bíta seinastu dagarnar, tingið var saman í seinastu viku. Og løgmaður hevur jú sjálvur alment boðað frá, eftir at valið var útskrivað, at nú fór landsstýrið bert at umsita og ikki at taka størri politiskar avgerðir. Men hvat eru slíkar samráðingar, sum eru í gongd millum Føroyar og Danmark, annað enn politikkur? Yvirtøkan av fólkakirkjuni, løgregluni og rættarskipan eru sanniliga politiskar, sum eisini Høgni Hoydal undirstrikaði í útvarpinum, tí alt tað praktiska var fingið upp á pláss, júst sum hann sjálvur málbar seg.

Vit løgdu eisini til merkis, at tá valstríð var í Bretlandi, tá steðgaðu samráðingarnar um markið. Vit sóu tað sama í Danmark, tá fólkatingsvalstríðið var í novembur í fjør. Tá steðgaðu eisini samráðingarnar millum Føroyar og Danmark. So hetta er púra vanlig mannagongd í øllum vanligum demokratiskum samfeløgum, so hví ikki eisini í Føroyum? Tí taki eg tað fyri givið, at samráðingarnar millum Føroyar og Ísland um markið millum londini eisini steðgar nú til eftir valið.

Eg eri samdur við Høgna Hoydal í tí, at tað er sera óheppið, at tað er ein danskur forsætismálaráðharri, sum ger vart við hetta, tí tað áttu vit sjálvandi sjálvur at gjørt. Virdu tit vanligu politisku spælireglurnar í Tinganesi, so skuldi løgmaður longu mánadagin, tá valið varð útskrivað, sent donskum myndigleikum bræv, har hann boðaði frá, at allar samráðingar steðgaðu til eftir løgtingsvalið.

Bert spell, at løgmaður ikki gjørdi tað, ella at onkur lýddi honum tað í oyra. Uppaftur meira spell, at Fogh skuldi gera tað, sum løgmaður sjálvsag sjálvur átti at havt gjørt.

# Tú kanst ikki rópa eitt fólk niður at liggja

**Høgni Hoydal**
*Formaður í Tjóðveldisflokkinum*



Huff, sum tað er oyðileggjandi at hoyra hetta niðurbrótandi rópariíð hjá heilum politiskum flokkum. Og nú eisini aftur frá forkvinnuni í Føroya Arbeiðarafelag. Tey mála ósannar skuggar á veggin, sum skulu brúkast til at ræða føroyingar til at trúgva, at vit klára okkum ikki uttan olmussu úr Danmark.

Hóast ongantíð eru skapt so nógv sosial framstig, sum síðani føroyingar settu frælsið og ábyrgdina fremst, fyri 4 árum síðani.

Hava tey ongan politikk og ongar visiónir fyri Føroyar og føroyingar? Hava tey onki annað upp á hjartað enn at rópa: Bøøø...?

**Tann umvenda verð**

Hugsið tykkum, um flokkar í øðrum londum, høvdu sagt tað sama sum javnaðar- og sambandsflokkurin siga við føroyingar. Um danskir flokkar høvdu sagt: Nei, okkara sjúkrahúsverk riggar ikki nóg væl - vit mugu gevast at vera sjálvstøðug tjóð og melda okkum inn í Týskland.

Ella um vit hugsaðu á sama hátt sum einstaklingar og familjur. Tildømis tá vit settu búgv fyrstu ferð. Nei, húsini ella íbúðin eru ikki liðug enn - vit mugu gerast ómyndug og fáa onkran annan at ráða yvir okkum. Ella um vit leigaðu í einum eldri og slitnum húsum: Nei, her er ov nógv at gera við íbúðina - vit mugu gevast við at hava sjálvsvirðing og lata vera við at krevja somu rættindi sum onnur fólk. Onkur annar má yvir okkum ráða.

**Kom til arbeiðis**

Hví ikki heldur fara til arbeiðis og gera nakað við tað, sum ikki er nóg gott? Lat okkum brúka orkuna til at byggja upp. Ikki til at bróta niður.

Vit mundu lagt samfelagið heilt í oyði undir heimastýrinum, tá vit brúktu allan blokkstuðulin og meira afturat. Og til dømis hevur javnaðarflokkurin umsitið almanna- og heilsumál meginpartin av tíðini - eisisni tey seinastu 10 árini.

Men kortini royna tey at rópa eina ræðumynd fram av sínum egna verki - við tí endamáli at vinna politiskt livibreyð.

Tak nú tildømis ræðumyndina um eldrarøktina. Øll kenna tørvin á at gera nakað við hendan vána arvin frá heimastýrinum og vilja hava málið loyst. Kommunurnar hava bygt fleiri sambýlir kring landið seinastu árini og eru farnar undir at byggja ellis- og røktarheim. Og landsstýrið hevur stuðlað.

Men her er nógv eftir at gera, men nú hava vit møguleikan, tí skil er í búskapinum.

**Land er bygt**

Veruleikin er, at Føroya fólk hevur langt síðani prógvað, at tað megnar at skapa eitt gott samfelag á egnum beinum. Og tað hevur ongantíð gingið betur, enn síðani vit fóru at seta blokkstuðulin til viks.

Sjálvandi megna vit eisini at tryggja øllum eitt gott lív í Føroyum uttan danska olmussu. Sjálvandi megna vit eisini í felag at skapa einar Føroyar, har vit øll kunnu virka, liva og elska. Tað hevur fólkið í landinum víst seinastu árini. Neyvan finst í heiminum nakað dømi um eitt fólk, ið hevur reist seg so skjótt og skapt so nógv virðir, sum føroyingar hava gjørt seinastu 4 árini.

Føroyingar hava bygt land. Tað fer ikki at eydnast at rópa eitt heilt fólk niðuraftur at liggja.